# ÍV TIL TÓNLEIK



**FRAMTÍÐ**

*– Eg vóni at kunna liva av tónleiki í framtíðini, sigur 21 ára gamla songkvinna, Vígdis Fjallstein av Norðskála. Hon hevur longu tikið fyrstu stigini á hesi lívsleið síni*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Eg eri tann eg eri

*Seinastu tvey árini hava mong eygu verið vend ímóti teimum ungu gentunum í bólkinum og tí tónleiki, sum tær framføra. Vandi er altíð til staðar, at tær gerast so upptiknar av bólkinum, at tær gloyma umhvørvið og baklandið rundan um seg. Men tað heldur Vígdis ikki at hon hevur gjørt. – Nei, tvørturímóti haldi eg, at sambandið við vinir mínar er vorðið betri, um eg skal siga nakað um tað. Orsøkin til tað er, at eg eri vorðin meiri opin mótvegis øðrum, og eri eisini vorðin ein meiri glaður og útatvendur persónur. – Eg havi so allar teir vinirnar sum eg hevði áðrenn, og havi fingið fleiri aftrat. Og tað kemur ikki av tí, at eg vorðin limur í FAROE5, men bara tí, at eg eri tann eg eri.*

fyrsta sinni. Her var ikki nógv tíð at geva út, tí bert tveir mánaðir seinni skuldi FAROE5 fyrstu ferð á pall - og tað enntá til eina útgávukonsert.

Og tær fimm sangglaðu genturnar kundu ikki fingið betri byrjan. Fyrsta framførslan var í SMS, har eini 1200 fólk vóru til framførsluna.

– Jú, tað var stuttligt at standa á palli og framføra fyri so nógvum fólkum, sigur Vígdis við einum brosi.

Henda fyrsta stakfløgan »Bara 1 spæl« varð væl dámd av fólki, – so væl, at tittullagið gjørdist best umtókta lagið í sendingini »15 tær bestu« í Kringvarpinum.

**»** **Eg havi allar teir vinirnar sum eg hevði áðrenn, og havi fingið fleiri aftrat. Og tað kemur ikki av tí, at eg vorðin limur í FAROE5, men bara tí, at eg eri tann eg eri**

### Ein dreymur

Til tess at gera tað meiri spennandi var henda allarfyrsta framførslan hjá FAROE5 tikin uppá sjónband.

Vígdis og hinar fýra hava hugt aftur eftir upptøkuni, og hon kann í dag bert staðfesta eitt: Hon og hinar í bólkinum eru nógv mentar hesi bæði árini.

– Um eg hugsi um, hvar eg var fyri tveimum árum síðani og so í dag, er stórur munur á. Man mennist sjálvandi nógv eftir tveimum árum, og tað ger man óansæð um man er við í einum bólki ella ikki.

– Men persónliga havi eg fingið so nógv positiv upplivilsir saman við FAROE5 á festivalum, konsertum eins og vit hava spælt fløgur inn. Hetta eru alt ting, sum eg bert tordi at droyma um fyrr, men sum eg nú sjálv eri vorðin partur av, greiðir Vígdis íðin frá.

Og hon leggur – ikki sørt spent – aftrat:

– Hetta ger eisini sítt til, at man nú fær blóð uppá tonna, soleiðis at tað sum eg droymi um – at kunna liva av tónleiki – kanska kann gerast veruleiki.

*snorri@sosialurin.fo*